Apríl 2010

# einfaldari

*- ger tað einfaldari*

## Visiónir fyri ungdómsarbeiðið



*Ilda & Rúni*

**Ilda og Rúni Lómstein greiða her frá teirra visiónum fyri ungdómsarbeiðnum í Lívdini.**

Vit hava altíð følt okkum kallað til at virka ímillum tey ungu. Ilda kom til trúgv á Jesus, tá ið hon var 12 ár, og byrjaði at arbeiða við ungdómi frá tí, at hon var 15 ára gomul, í sínari samkomu í Kap Verde og seinni umborð á Logos 2. Hon hevur arbeitt við tí kreativa so sum dansi, drama og lovsangi. Rúni kom til trúgv í barnaárum, og tá hann var 17 ár, bleiv hann virkin í tónleikinum og í ungdómsarbeiðinum í Ebenezer. Okkara hjartamál hevur altíð verið at síggja ein ungdóm, sum ynskir at fylgja Jesusi til fulnar.

Okkara visión er at síggja hesi øki blíva ein náttúrligan part í okkara arbeiði og okkara lívi við Jesusi: bøn, evangelisering, læra, tilbiðjan, tænasta, praktisk hjálp og stuttleiki.

*Framhald inni í faldaranum*

lívdin – í livd hins hægsta

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Fullkomna ofrið

Eitt lítið skriftbrot, sum eg altíð grundi á um páskirnar, er: "Forhangið í templinum skrædnaði eftir miðjuni." Luk 23.45.

Hetta er óivað tann sterkasti symbolikkurin nakrantíð. Allar tær fyriskipanir við tabernaklinum, templinum, ofrunum, prestatænastunum og høvuðsprestatænastuni, sum Ísrael hevði livað við í ártúsund, alt hetta, sum minti á skilnaðin millum Gud og menniskja, var í einum nú komið at enda.

Tann fulkomni høvuðsprésturin hevði ofrað seg sjálvan sum tað fullkomna lambið, og tváað og fjald í blóði Hansara hava vit fría atgongd inn til Guds heilagleika.



*Guttorm Joensen*

Vit kunnu nú við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar, so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð.

# Lívdin

### Torkil við Sandá 60



Mikudagin 24. mars fylti Torkil við Sandá í Havn 60 ár. Torkil vaks upp í Kaldbak sum yngstur av 9 systkjum, sonur Herborg og Ingvard Petersen.

Torkil byrjaði í skúlanum í Kaldbak í 1957, men flutti til Havnar í 1961. Hann fór til skips sum 14 ára gamal, og í 1969 fór hann í læru sum timburmaður. Hann hevur smíðað nógv í Føroyum, bæði sum sjálvstøðugur byggimeistari og saman við øðrum. Hann arbeiddi eisini í mong ár sum portørur á Landssjúkrahúsinum.

Torkil er giftur við Birgith, dóttur Solveig og Óla Christian Jacobsen í Havn. Birgith og Torkil eiga fimm børn: Beintu, John, Óla Christian, Herborg og Benny.

### Praktisk umsorgan í Lívdini



Hjálparhondin er ein praktisk umsorganartænasta í Lívdini, sum veitir umsorgan, tá onkur hevur átt, tá onkur er álvarsliga sjúkur ella er sjúkur í longri tíð, tá fólk verða rakt av sorg og øðrum umstøðum, sum gera, at tey hava brúk fyri umsorgan.

Hjálparhondin heitir á fólk í samkomuni um at hava eygu og oyru opin, soleiðis at vit sjálvi fylgja við í, hvør hevur umsorgan fyri neyðini. Ynski okkara er, at fólk í samkomuni geva okkum boð um, hvørji fólk hava brúk fyri umsorgan, soleiðis at eingin dettur burtur ímillum. Upplýsingar um tørvir hjá fólki verða altíð viðgjørdir í trúnaði.

Hanna Nielsen tlf. 310155 og fartlf. 510155. mail adr: hangun@post.olivant.fo

Beinta Áargarð tlf. 312655 og fartlf. 512655. mail adr: aargard@kallnet.fo

### Heimasíðan hjá ungdóminum




Eftir at hava verið óvirkin í eina tíð er heimasíðan hjá teimum ungu í Lívdini: www.ung.livdin.fo aftur virkin. Heimasíðan er broytt nakað og hevur fingið nýtt snið.

Vit ætla við hesi síðuni fyrst og fremst at kunna um, hvat fer fram í ungdómsarbeiðinum í Lívdini, og annars ætla vit eisini at leggja ymiskt spennandi út, siga teir báðir Ásbjørn V. Gunnarsson og Eirik O. Nielsen, sum hava ábyrgd av heimasíðuni.

### Samkomulegan á Zarepta




Samkomulegan hjá Lívdini verður á Zarepta vikuskiftið 7.-9. mai 2010. Nærri verður lýst seinni um leguna.

*Framhald frá forsíðuni*

# Visiónir fyri ungdómsarbeiðið

Vit trúgva, at hesi øki eru neyðug fyri at náa tey ungu í samkomuni og fyri at gera okkum sjónlig í samfelagnum. Vit stremba eftir, at tey ungu, serliga tey eldru børnini, sum ganga í fólkaskúlanum, skulu koma at kenna Jesus. Men arbeiðið steðgar ikki har. Vit ynskja ikki bert at náa tey, men brynja, fyrireika og vegleiða tey til at blíva lærisveinar, sum breiða út Guds orð. Um hetta skal gerast veruleiki, so mugu vit eggja ungdóminum at nýta og menna teirra gávur fyri Jesus.

Sum nú er, eru vit bara byrjað at skipa ungdómsarbeiðið. Nógv hugskot, verkætlanir og umráðandi uppgávur eru í ferð við at mennast. Í løtuni hava vit fýra bólkar, har bæði ung og tilkomin eru við, og tey skipa fyri ymiskum aktivitetum fyri tey ungu bæði fríggja- og leygarkvøld.

Fríggjakvøldini eru ætlað til tey ungu í samkomuni, har tey hittast á Brekku at hugna sær saman og koma at kenna hvønn annan. Hesi kvøldini eru ikki so skipað, men tó verða ymisk evni tikin upp.

Leygarkvøld er fyri alla samkomuna og onnur at koma saman við teimum ungu, fyri at uppliva Gud á ein upplyftandi hátt. Serligur dentur verður lagdur á tónleik, drama, dans, list, stuttan boðskap, forbøn og nógv annað.

Tað eru eisini aðrir aktivitetir í gongd, sum tey ungu sjálvi skipa fyri, har vit síggja Gud til verka. T.d. er bønarløta mánakvøld og bíbliutímar týskvøld, og hesi tiltøk eru ein sera umráðandi partur í ungdómslívinum í Lívdini. Vilt tú vita meira um ungdómsarbeiðið, so ert tú vælkomin at vitja heimasíðuna www.ung.livdin.fo.

*Ilda og Rúni*

## Tiltøk

### Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing og bøn týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 6. apríl: | Húsbólkar |
| 13. apríl: | Bønarmøti |
| 20. apríl: | Bønarmøti |
| 27. apríl: | Húsbólkar |

### Hjálparfólk til Teenstreet

Hvørt ár er brúk fyri nógvum hjálparfólki til TeenStreet, sum verður í Oldenburg í Týsklandi í døgunum frá 29. juli til 4. august 2010.

Arbeiðsuppgávurnar eru sera ymiskar sum t.d. í køkinum, á eini café, á bókasøluni, á skrivstovuni, security, barnaansing og ArtZone, har tey læra at mála og tekna. Har er onkur uppgáva til øll.

Til Teenstreet koma umleið 3.000 tannáringar úr 25 londum. Endamálið er, at tannáringarnir skulu læra Gud betur at kenna gjøgnum ymisk áhugaverd tiltøk sum t.d. læru, lovsong og tilbiðjan. Eisini verður nógv gjørt burtur úr, at tey hugna sær saman og hava tað stuttligt.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Ruth Gaardlykke: ruth@teenstreet.fo tel. 519090 ella Anitu Tausen: anita@teenstreet.fo tel. 597842.

Meira upplýsingar á: www.teenstreet.fo



**Bíbliuskeið umborð á Norrønu**

Smyril Line gongur nýggjar leiðir. Nú verður boðið til bíbliuskeið umborð á Norrønu á túrinum til Seyðisfjarðar mánadagin 31. mai til hósdagin 3. juni 2010. Samskiparar eru Poul Jóhan Djurhuus og Páll á Lakjuni.

Evnini verða ymisk sum t.d. hjúnabandið, familjan og tríggjar minniligar sjóferðir. Eisini verða onnur evni á skránni. Luttakararnir verða trý kvøld umborð á Norrønu, og hesi kvøldini verður skipað fyri kvøldsetum.

Tilmelding og kunning um ferðina: martinj@smyril-line.fo ella á telefon 215909. Eisini er møguleiki at seta seg í samband við Poul Jóhan Djurhuus, t-post: gjaranes@olivant.fo ella tlf: 228314. Seinasta freist at melda til er 15. apríl.




## Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt




### Sunnudagin 4. apríl

Páskamøti 12.00-13.00: *Evni: Uppreisnin*
*Talari: Hallur Mortensen*

### Sunnudagin 11. apríl

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Avgerandi løtur í mínum lívi*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Skulu vit akta yvirvøldina?*
*Rómbrævið 13:1-7*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 18. apríl

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Tiltak fyri børn*
*Fyriskipari: Guttorm Joensen*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Lívdin - Hvat vilja vit?*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 25. apríl

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Rúmdin*
*Talari: Jens Wang*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Hvussu skulu vit so liva?*
*Rómbrævið 13:8-14*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Tiltøk:

Leygarkvøldið 10. apríl kl. 21.00: *Ungdómstiltak*
Leygarkvøldið 17. apríl kl. 20.00: *Hoyvíkstiltak*
Leygarkvøldið 24. apríl kl. 21.00: *Ungdómstiltak*

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*